

Sosialurin

# Stóran týdning at útró

**Tað er ikki Fiskamarknaður Føroya, sum hevur álagt skipum og bátum hægri gjøld, men Landingarmiðstøð Føroya. – Sølugjaldið hjá okkum er ikki hækkað í fleiri ár, og tey 0,75% av søluvirðinum, sum vit taka, svara til umleið 7 oyru fyri hvørt kilo í 2009, sigur Fiskamarknaður Føroya sum annars harmast um, at fiskaprísirnir eru so lágir**

## Umborð




**Vilmund Jacobsen**
blaðmaður
vilmund@sosialurin.fo


Í grein í Sosialinum herfyri skrivaðu vit um umstøðurnar hjá útróðrarmonnum, sum í longri tíð hava verið út av lagi vánaligar. Fiskiskapurin hevur verið slakur, men tað, sum hevur gjørt inntøkuviðurskiftini uppaftur verri, er, at fiskaprísirnir hava verið so sera vánaligir.

Útróðrarmaður, sum vit tosaðu við, vísti eisini á, at tað er vorðið dýrari – og eisini truplari - at sleppa av við fiskin.

Í greinini gjørdu vit ta mistak at brúka navnið Fiskamarknaður Føroya, tá vit skrivaðu um økt gjøld og sektir fyri eitt nú ófráboðaða landing, sum fer fram uttanfyri vanligu dagtímarnar hjá Landingarmiðstøð Føroya.

Tó at tað er vorðið dýrari hjá monnum at sleppa av við fiskin um uppboðssølu, kemst hetta ikki av, at kostnaðurin fyri sjálva søluna hjá Fiskamarknaði Føroya er øktur.

Tað er hann nevniliga ikki. Hinvegin eru tað landingarútreiðslurnar, sum eru øktar.

### Skild sundur

Tá Fiskamarknaður Føroya (FMF) varð stovnaður tíðliga í nítiárunum, vóru landing og søla í einum felag, men hin 31. desember í 2004 vórðu feløgini skild sundur, og núverandi Fiskamaknaður Føroya er stovnaður hin 1. januar í 2005.

Síðan 2005 hevur Landingarmiðstøð Føroya landað og avgreitt skip og bátar, meðan FMF hevur tikið sær av sjálvari søluni.

- Vit eru kedd um, at misskiljingar eru komnar í nevndu grein. Tað, sum tað kostar at selja á Fiskamarknaði Føroya, er 0,75% av søluvirðinum. Er sølan minni enn eitt vist, er eitt minstagjald á 50 krónur. Øll onnur gjøld, sum standa á avreiðingarseðlinum, tá avroknað verður, eru gjøld, sum aðrir krevja inn – og ikki vit, sigur Oskar Joensen, sum starvast hjá Fiskamarknaði Føroya.

Hann vísir á, at FMF hevur eingi gjøld hækkað í fleiri ár, og at tey 0,75% av søluvirðinum svara til umleið 7 oyru fyri hvørt kilo í 2009.

Høgni Hansen, sum eisini starvast hjá FMF, leggur aftrat, at tað helst hevði verið torført at funnið eina uppboðssølu úti í heimi, sum er bíligari enn føroyska uppboðssølan.

Báðir harmast teir um lágu fiskaprísirnar.

Í nevndu grein varð ikki í nóg stóran mun skilt ímillum, at tað er Landingarmiðstøð Føroya, sum landar av avgreiðir viðurskifti, sum eru tengd at landingini, meðan Fiskamarknaður Føroya bert tekur sær av sjálvari søluni.

Fyri útróðrarmannin ger hesin skilnaður sjálvandi ikki tann stóra munin, tí kostnaðurin fyri samlaða "pakkan" verður hin sami – antin tað er landingarparturin ella sóluparturin, sum krevur meira. Fyri útróðrarmannin snýr tað seg um, hvørjar útreiðslur eru tengdar at tí parti, sum hevur við landing og sølu at gera.

Og tað eru hesar útreiðslur, sum útróðrarmaðurin í fyrsta lagi fýltist á eru øktar og enntá við sektarbót, um fráboðanarskyldan ikki verður hildin, og fiskurin verður landaður í dagtímunum.

Stóri trupulleikin hjá útróðrarmonnum er, at ov lítið fæst burtur úr fyri ta veiði, sum hann megnar at draga upp úr sjónum ein útróðrardag, samstundis sum útreiðslurnar av landing eru øktar.

Omanyvir slaka veiði, lágar fiskaprísir og hægri landingarútreiðslur koma so gjøld sum eitt nú barsilsgjald og arbeiðsmarknaðargjald, sum fara avstað við enn einum parti av tí sindri, sum eftir er, tá avroknað verður.

### Einki burtur úr

Útróðrarmaðurin, sum vit tosaðu við, greiddi okkum frá, hvat seinastu tríggir útróðrardagarnir hjá honum høvdu givið. Hann hevði sett tilsamans 36 línur – 12 línur hvønn dagin. Samlaða veiðan fyri hesar dagarnar var 3.800 pund, og tað er ikki nøkur ring veiða, soleiðis sum fiskiskapurin hjá útróðrarbátunum hevur roynst.

- Eg var í bátinum í tilsamans 42 tímar hesar tríggjar dagarnar, og tá avroknað varð, var mín partur 420 krónur. Hetta gevur eina tímaløn upp á 10 krónur um tíman, segði hann.

Hann legði aftrat, at meginparturin av veiðini hesar tríggjar seturnar var hvítingur, sum fór fyri ein miðalprís á 6 krónur fyri kilo. Prísurin á hvítingi lá annars millum 5, 6 og 7 krónur fyri kilo, og hýsan fór somu dagar fyri einar 5-7 krónur fyri kilo.

- Vit skulu av við umleið hálva aðru krónu fyri kilo til landing og sølu tilsamans, og tað vísir seg, at tað alsamt gerst dýrari at sleppa av við fiskin. Byrjunargjaldið var 50 krónur. Nú hevur Landingarmiðstøð Føroya so lagt 75 krónur omaná. Aftrat hesum koma so prosentini fyri sjálva søluna. Er nøgdin av fiski lítil, gerast landingarútreiðslurnar lutfalsliga størri.